# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI G2 NEYSTAØKIÐ

## Í Syðrugøtu

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Eysturkommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað til neystaøkið, sum er G2 øki í Syðrugøtu í Almennu Byggisamtyktini fyri Eysturkommunu og er á viðfestu kortskjølum 1 til og við 5 í Serstøku Byggisamtyktini, frá mars 2021. G2 neystaøkið er deilt upp í hesi trý øki:

Øki 1, galdandi fyri matriklar nr. 37, matr. 51, matr. 166, matr. 104a, matr. 151, matr. 69, matr. 266, matr. 34, matr. 141, matr. 265, matr. 18, matr. 66, matr. 165 og matr. 195.

Øki 2, galdandi fyri matriklar nr. 269, matr. 125, matr. 183, matr. 268, matr. 3b, matr. 139, matr. 2, matr. 28, matr. 132, matr. 122, matr. 267 og matr. 193.

Øki 3, galdandi fyri matriklul nr. 29

Eisini er serstaka byggisamtyktin galdandi fyri matriklar í øki 2 og matriklar í øki 3, í sama neystaøki í Syðrugøtu og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ognum. Sí kortskjøl 1 til og við 5 í Serstøku Byggisamtyktini.

## §2. FRÁGREIÐING UM ØKIÐ

Stk. 1. Endamálið við hesi Serstøku Byggisamtykt er at skipa neystabygging og virksemi á G2 økinum í Syðrugøtu.

Stk. 2. Ætlanin er, at neystini í Øki 1 verða varðveitt á tann hátt, at allir verandi matriklar verða, sum teir eru í dag og kunnu ikki leggjast saman ella deilast sundur. Um nýggj vitan kemur fram, í sambandi við útgrevstur ella líknandi fornfrøðiligt kanningararbeiði, kann Eysturkommuna tillaga hesar treytir.

Stk. 3. Neystini liggja í einum G2 øki, sum kunnu brúkast til neyst við nýttum lofti, við nýttum loftið skilst, at byggjast kann uppihaldsrúm, køks-, vesi, og/ella baði-viðurskiftið.

Stk. 4. Umframt neystini við nýttum lofti, er eisini talan um eitt stórt matrikul 37, sum Eysturkommuna eigur. Hetta matrikul er, sum er, fyri tað mesta ikki bygt,. Tó hava neyst staðið á hesum matrikli fyrr. Ein sjónlig grund stendur inni á hesum matrikli norðast á matriklinum nr. 37.

Stk. 5. Nýtslan á matrikul 37 er serliga ætlað til fjølbroytt virksemi, sum hevur við neystini at gera, uppihald í sambandi við hesi og trivnað, sum er knýtt á neystum, ymiskum bátavirksemi og havinum.

Stk. 6. . Fyri viðurskifti, sum ikki eru regularaði í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktin fyri Eysturkommunu galdandi.

Stk. 7. Matrikul 37, sum er stóra matrikulið í G2 neystaøkinum í Syðrugøtu, er trivnaðarøki burturav. Hetta økið verður brúkt til ymiskt, sum Eysturkommuna gevur loyvið til. Eisini kann Eysturkommuna geva fyribilsloyvi, at brúka hetta økið til onnur endamál í styttri tíðarskeið, t.d. á eina til tvær vikur.

Stk. 8. Matrikul 37 kann eisini nýtast til onnur endamál, um Eysturkommuna metir, at hetta styrkir heildarmyndina av neysta- og trivanðarøkinum. T.d. kann Eysturkommuna loyva at gera smærri byggingar, so sum pottar til dipping, hitarúm, verjuveggir til umklæðing, timburgólv til uppihald, søluplass og tílíkt.

§3. NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1.

Økið kann nýtast sum neystaøkið við nýttum lofti. Eigarin av neystinum ber allar útreiðslur í samband við íbinding í kommunalar leiðingar. Neystini kunnu ikki nýtast til bústað ella leigubústað.

Eisini kann annað virksemi verða, sum er í umhvørvisflokki 1 fyri Eysturkommunu. Eysturkommuna skal í hvørjum einstøkum føri flokka virksemi, ið ætlanin er at hava í G2 neystaøkinum.

Stk 2. Eisini er møguligt at hýsa minni virksemi, ið eru flokkað í umhvørvisflokki 1 í Umhvørvisflokking fyri Eysturkommunu, samtykt av býráðnum 05. novembur 2012, har tað verður mett ráðiligt av býráðnum.

Stk.3. Hetta virksemið skal avmarkast soleiðis, at tað ikki førir við sær nakra ferðslu við størri akførum og ferðslu frá starvsfólki ella viðskiftafólki til og frá økinum, sum vil órógva meira enn umhvørvisflokking 1. Um ein neyv kanning verður gjørd fyri virksemi og møguliga tillagingar verða gjørdar, soleiðis, at virksemi kann tillagast økinum, kann Eysturkommuna loyva umhvørvisflokking 2 fyri virksemi, sum er tíðaravmarkað.

§4. BYGGING, STØDD, STAÐSETING

4.1. Byggistig má í mesta lagi verða 1,0.

4.2. Neyst í øki 1 skulu hava møn og hava takhall millum 25 og 45 gr.

4.3. Á hvørjum grundøki kann byggjast eitt neyst, sum eisini kann hava nýtt loft, sum tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð ella brúkast sum fastur bústaður.

4.4. Mest loyvdu hæddir er 5 metur fyri hesar matriklar í øki 1: Matr. nr 51, matr. nr. 166, matr. nr. 104a, matr. nr. 151, matr. nr. 69, matr. nr. 165 og matr. nr. 195. Sí kortskjal 1 og 5 í Serstøku Byggisamtyktini við hæddarásetingum.

4.5. Mest loyvdu hæddir er 6 metur fyri hesar matriklar í øki 1: matr. nr. 37, matr.nr. 266, matr. nr. 34, matr. nr. 141, matr. nr. 265, matr. nr. 18, matr. nr. 66. Sí kortskjal 1 og 5 í Serstøku Byggisamtyktini við hæddarásetingum.

4.6. Mest loyvda hædd fyri økið 2 er 7 metur. Sí kortskjal 1 og 5 í Serstøku Byggisamtyktini við hæddarásetingum.

4.7. Mest loyvda hædd fyri økið 3 er 10 metur. Sí kortskjal 1 og 5 í Serstøku Byggisamtyktini við hæddarásetingum.

4.8. Eingin byggilinja er, men skal øll bygging, bæði neyst og aðrir lutir av neystinum, verða inni á matriklinum.

4.9. Planeringskotan fyri áseting av hædd, verður í hvørjum einstøkum føri, ásett av byggivaldinum hjá Eysturkommunu.

## §5. ÚTSJÓND HÚSANNA

Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifultrúan.

Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## §6. BYGGING IÐ ER

Henda byggisamtykt er ikki til hindurs fyri, at núverandi lóglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við lógligari nýtslu av eini ogn.

Ikki er loyvt at vaksa um neyst við at byggja um, ella at taka tey til aðra nýtslu ímóti reglunum í byggisamtyktini. Øll umbygging av verandi, skal fráboðast byggivaldinum hjá Eysturkommunu skrivliga.

## §7. BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Byggingarmynduleiki og átelurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Eyturkommunu býráð einsamøllum.

## §8. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI.

Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| UMHVØRVIS - OG VINNUMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 22/06655 |
| Ætlanarskriv: | 23/6 - 2022 |
| Góðkent: | 30/6 - 2022 |
| Váttað: | H Poulsen |

# NEYSTAØKI Í SYÐRUGØTU

## SERSTØK BYGGISAMTYKT, DESEMBER 2021

### KORTSKJAL 1: LOFTMYND VIÐ MATRIKLUM 1:500

<u>Øki 1</u>

- Verandi matriklar
- Neystabygging í 6m hædd upp til mønu, neystini nærri sjónum
- Neystabygging í 5 m hædd upp til mønu, neystini nærri vegnum
- 25°-45° takhall

<u>Øki 2</u>

- Óbroytt í mun til ásetingar og treytir í verandi byggisamtykt fyri økið

<u>Øki 3</u>

- Óbroytt í mun til ásetingar og treytir í verandi byggisamtykt fyri økið



# NEYSTAØKI Í SYÐRUGØTU

BROYTING AV G2 NEYSTAØKI
KORTSKJAL 2: MARK FYRI BYGGISAMTYKT




Kortskjal 2: Broyting, samtykt 16. desember 2021

## NEYSTAØKI Í SYÐRUGØTU
BYGGING Í VERANDI NEYSTAØKI
KORTSKJAL 3: MYND AV NEYSTAØKI



# NEYSTAØKI Í SYÐRUGØTU

TRIVNAÐARØKI OG MØGULIG GØTUSAMBOND

KORTSKJAL 4



# NEYSTAØKI Í SYÐRUGØTU

BYGGING Í YMISKUM HÆDDUM

KORTSKJAL 5

